UTTAN ÚR HEIMI

## Skulu steðga Statoil

Norskur umhvørvisverndarfelagsskapir fýlast á, at Statoil fyrireikar seg til at vinna olju og gass í Barentshavinum, sjálvt um felagið ikki hevur fingið tey neyðugu loyvini enn.

Leiðslan í Statoil hevur ikki dult fyri, at felagið væntar sær nógv burtur úr tilfeinginum undir Barentshavinum. Kunningarstjórin, Sverre Kojedal, sigur við Aftenposten, at felagið ætlar sær at lata tað fyrsta gassið haðani longu næsta ár.

Men umhvørvisverndarfelagsskapir sum Bellona og Natur og Ungdom halda lítið um framferðina hjá tí almenna oljufelagnum. Guro Hauge í Bellona sigur við Aftenposten, at framferðin hjá Statoil vísir, hvussu lítið teir norsku politikararnir hava at siga, tá saman um kemur. Formaðurin í Natur og Ungdom, Ane Kismul, sigur við blaðið, at Statoil hevur sett fulla ferð á verkætlanina í Barentshavinum, tí so fáa politikararnir ikki gjørt annað enn at góðtaka hana. Ane Kismul heldur, at politikararnir eiga at taka seg um reiggj og seta oljufeløgini upp á pláss.

## Miseydnað átak

Tey seinastu fimm árini hevur USA latið stjórnini í Kolombia herútgerð og aðra hjálp fyri einar 30 milliardir krónur. Hjálpin er liður í einari semju, sum stjórnin hjá Bill Clinton gjørdi við táverandi kolombiska forsetan, Andreas Pastrana, og sum hevði til endamáls at hjálpa kolombiska stjórnarherinum í bardøgunum ímóti teimum ymsu uppreistrarrørslunum og at avmarka tann stóra rúsevnisflutningin úr Kolombia til USA.

Nú vísir ein kanning hjá amerikonsku Kongressini, at hjálpin hevur ikki gjørt stórvegis mun. Rætt er tað, at tað eru færri morð og burturflytingar í Kolombia nú er fyrr, men uppreistrarrørslurnar eru líka sterkar enn, og rúsevnisflutningurin til USA er at líka stórur enn.

Kortini hevur stjórnin hjá George W. Bush biðið Kongressina um fimm milliardir krónur afturat til Kolombia næsta ár, og tað mesta er ætlað sum hernaðarhjálp. Men sambært amerikanska sendiharranum í Kolombia er stjórnarherurin ikki førur fyri at basa uppreistrarrørslunum, sjálvt um hann fær størri stuðul úr USA.

## Krevja fría fosturtøku

Írskar kvinnur, sum hava verið í Bretlandi og fingið fosturtøku, fara nú undir enn eitt átak, sum skal geva írskum kvinnum rætt til fosturtøku í heimlandinum.

Síðani 1969 hava kvinnurnar stríðst fyri at fáa myndugleikarnar at loyva fosturtøku, og nú hava tær lagt eina nýggja ætlan, sum skal fáa politikararnar at taka undir við kravinum. Ivona Bacik, sum er professari í løgfrøði og talskvinna fyri fríari fosturtøku, sigur við AP, at hesaferð fara kvinnurnar at skipa so fyri, at spurningurin um fría fosturtøku verður ímillum høvuðsevnini upp undir næsta tjóðartingsvalið.

Av tí at tær írsku kvinnurnar ikki kunnu fáa fosturtøku í Írlandi, velja tær at fara til Bretlands ístaðin fyri, og hagtølini vísa, at árliga fáa umleið 6.000 írskar kvinnur fosturtøku har.

## Hann vil verða forsætisráðharri

Verður Framburðsflokkurin størsti borgarligi flokkurin á norska stórtingsvalinum í heyst, eigur floksformaðurin, Carl I. Hagen, at taka við sum forsætisráðharri.

Tað er í hvussu er ætlanin hjá formanninum sjálvum. Framburðsflokkurin er stuðulsflokkur hjá stjórnini hjá Kjell Magne Bondevik, men í seinastuni hevur Hagen fleiri ferðir sagt, at tíðin hjá Bondevik í norskum politikki er farin. Flokkarnir, sum mynda stjórnina, halda kortini uppá, at Bondevik er teirra forsætisráðharraevni á valinum í heyst.

Vónin hjá Carl I. Hagen er, at Framburðsflokkurin verður størstur á tí borgarliga vonginum aftan á valið, ella at flokkurin í minsta lagi fær sítt besta val higartil. Tað merkir, at flokkurin skal hava meiri enn 15,3 prosent av atkvøðunum.

# Schröder kann vinna



*Politiskt sjálvmorð, søgdu eygleiðararnir, tá Gerhard Schröder skrivaði út nýval. Nú vísir tað seg, at hann kann vinna kortini*
*Mynd: Reuters*

**Heilt óvæntað eru nú útlit til, at Gerhard Schröder kann verða afturvaldur til týskan kanslara tann 18. september**

TÝSKLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eygleiðarar vóru á einum máli um, at tað var politiskt sjálvmorð, tá Gerhard Schröder í summar gjørdi av at skriva út nýval í úrtíð, og tær fyrstu meiningakanningarnar vístu eisini týðiliga, at veljararnir fóru at geva honum og sosialdemokratiska flokkinum ein dyggan frammaná.

Nakrir fáir eygleiðarar ávaraðu um, at kanslarin hevur serlig evni til at menna seg, tá á stendur, og okkurt bendir á, at hetta er so. Nú vísa kanningar, at munurin ímillum sosialdemokratarnar og teir kristiligu demokratarnar er minkaður, og stendur hendan gongdin við tann næsta mánaðin, kann tað væl hugsast, at Schrøder hóast alt verður sitandi í kanslaraembætinum.

Sosialdemokratarnir hava víst á, at kanslaraevnið hjá teimum kristiligu demokratunum, Angela Mærkel, hevur ikki tær neyðugu royndirnar ella tað neyðuga dirvið til at leiða Týskland. Hesum munnu teir flestu veljararnir taka undir við, tí kanningar vísa greitt, at bleiv kanslarin valdur beinleiðis, hevði Schröder vunnið stórt.

Báðir partar hava innanhýsis trupulleikar at dragast við. Schröder er í øðini inn á tríggjar ráðharrar, sum hava skotið upp, at sosialdemokratarnir og teir kristiligu demokratarnir eiga at skipa samgongustjórn aftan á valið. Ikki talan um, sigur kanslarin. Hansara mótvalevni hevur eisini sítt at stríðast við. Eitt nú hevur eitt uppsskot hjá hennara egnu um at hækka meirvirðisgjaldið fingið veljararnar at venda flokkinum bakið, og nógvir eysturtýskarar eru í øðini um, at valevni hjá kristiligu demokratunum geva kommunismuni í DDR skyldina av harðskapinum og kriminalitetinum har eysturi í landinum.

Sjálv hevur Angela Mærkel ein stóran trupulleika. Á sjónvarpsskíggjanum hevur hon ongan møguleika at kappast við Schröder, og tað hevur týdning í einum valstríði, skrivar DPA.

# Amerikanararnir kendu Mohammed Atta

**Longu eitt ár undan atsóknini 11. september í 2001 kendu amerikonsku myndugleikarnir oddamannin hjá flogrænarunum**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Um morgunin tann 11. september í 2001 tóku eftirlitstólini í floghavnini í Portland myndir av Mohammed Atta, meðan hann var á veg í flogfarið, sum hann seinni stoytti inn í World Trade Center í New York.



*Mohammed Atta. Longu í 2000 vistu amerikanararnir, at hann var limur í al-Qaeda*
*Mynd: Reuters*

Nú vísir tað seg, at amerikonsku myndugleikarnir vistu væl, at Mohammed Atta var limur í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda. Í samrøðu við New York Times avdúka ein fyrrverandi embætismaður hjá CIA og kongresslimurin Curt Weldon, at CIA var vitandi um, at Atta og tveir av hinum flogrænarunum vóru limir í al-Qaeda.

Sambært teimum báðum visti CIA longu í 2000, at Mohammed Atta, Khalid al-Mindhar og Nawaf al-Hazmi vóru limir í felagsskapinum hjá bin Laden, og at teir kundu vera ein hóttan.

Kortini fekk samveldisløgreglan FBI ikki upplýsingarnar um teir tríggjar fyrr enn á vári í 2001, og sambært Curt Weldon er hetta enn eitt tekin um, at at tær amerikonsku trygdartænasturnar hava ilt við at samstarva og at lata hvør aðrari týðandi upplýsingar. New York Times vísir í hesum sambandi á, at tann almenna frágreiðingin um tað, sum hendi upp undir tann 11. september í 2001, sigur ikki eitt orð um, at nakar amerikanskur myndugleiki var vitandi um, at Mohammed Atta og hinir báðir vóru limir í al-Qaeda.